# Gittari hjá Dimebag Darrell partur av Hardrock Café í New York



Dimebag Darrell var gittarhetja fyri eitt ættarlið av tungmálmsgittarleikarum

Tá Hard Rock Café hátíðarhelt 35 ára føðingardagin hjá ketuni í New York, varð nógv gjørt burturúr. M.a. spældi Mötley Crüe saman við Steven Tyler. Men ein av mest rørandi løtunum var tá fyrrverandi Panthera og Damageplan trummarin Vinnie Paul handaði ein av gittarunum hjá deyða beiggja sínum Dimebag Darrell til Hard Rock Caféina í New York. Dimebag Darrell varð í 2004 skotin saman við fleiri áskoðarum og hjálparfólki á eini konsert hjá Damageplan. Drápsmaðurin var sera sálarliga sjúkur. Tá Vinnie Paul handaði gittarin, segði hann við Reuters, at hann gleddist um at hesin gittarin, ið Dimebag Darrell hevði bukað av hvørt kvøld, nú gjørdist partur av Hard Rock Caféini í New York.

**nud**



Vinnie Paul spældi saman við bróður sínum Dimebag Darrell í bólkunum Panthera og Damageplan.

## COURTNEY LOVE SKELKAR AFTUR




Á kápumyndini á nýggju bókini hjá heimskenda myndamanninum David LaChapelle, skelkar Courtney Love enn einaferð. Einkjan hjá deyða grunge guðinum Kurt Cobain, er avmyndað sum Maria moy. Sitandi við líkinum av Jesusi. Jesus er tó ikki Jesus á myndini, men ein maður, ið minnur nógv um Kurt Cobain. Ístaðin fyri naglamerkini í hondunum, er armurin merktur av nálamerkjum. Á borðinum liggja rúsevnir og guðdommiliga ljósið á myndini stavar frá eini berari peru. Kurt Cobain skeyt seg sjálvan, men hevði somikið nógv heroin í kroppinum, at tað hevði kunnað beint fyri 3 monnum, skrivar enska dagblaðið The Sun.

Á myndini spælir eitt pinkubarn á gólvinum frammanfyri Love og Cobain, hetta kundi verið Francis Bean Cobain, dóttur parið, ið einans var hálvt annað ár, tá pápi hennara beindi fyri sær sjálvum.

**nud**

David LaChapelle, Heaven To Hell bind 3, Taschen 2006

## SCARLETT JOHANSSON ER TANN EGGILIGASTA

Scarlett Johansson hevur fyri aðru ferð í ár fingið heiðurin, sum heimsins mest eggiliga kvinna. Í apríl vóru tað lesarar í mannfólkablaðnum FHM, ið valdu vælskaptu ljóshærdu sjónleikarkvinnuna til heimsins mest eggiligu kvinnu, og hetta eru fólkini á Esquire Magazine samd í. Í oktober útgávuni av blaðnum fær hon sama heiður, og í hesum sambandi hevur blaðið eina myndarøð við 21 ára gomlu Scarlett. Hon prýður somuleiðis forsíðuna í blaðnum, skrivar tv2.dk.

Í samrøðu við blaðið sigur Scarlett, at hon helst vil minnast fyri annað enn sína útsjónd og spyr:

– Hvat við mínum heila? Hvat við mínum hjarta?, míni livur og míni bløðru?

Tá hon í apríl fekk sama heiður frá FHM, tyktist hon at gleðast um heiðurin og segði, at allar kvinnur dáma, at onkur heldur tær vera penar.

**nud**



Scarlett Johansson er eggiligasta kvinna í heiminum

mynd: Scarlettjohansson.com




Jack Nicholson umhugsar at skifta virkisøki

# Jack Nicholson umhugsar alnethandil

Undir upptøkunum av komandi filminum hjá Jack Nicholson The Departed, ið kemur til Evropa í november, spældi Nicholson eina senu, har hann var í song við tveimum ungum damum og ein av teimum hevði ein sokallaðan strap on dildo. Senan varð klipt burtur úr endaliga filminum, men henda uppliving gjørdi somikið stórt inntrykk uppá Nicholson, at hann skemtaði við henni, tá hann var til frumsýningina av filminum í New York í vikuni. Hann greiddi frá, at hann ætlaði sær undur at selja tílíkar kynsleikur á alnetinum, serliga dildoar í neonlitum, skrivar tv2.dk.

Hóast senan við Nicholson og strap on dildoinum er klipt út, so luttekur kynsleikan í filminum, í eini senu við Matt Damon.

